LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 28. februar 2025
J. nr.: 25/05154-3

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-086/2024 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, um kunning um hvussu danskir myndugleikar loysa sína uppgávur í Føroyum.

Spurningurin var soljóðandi:

1. Í hvønn mun fær landsstýrismaðurin kunning um virksemi og støði á virkseminum hjá donskum myndugleikum í Føroyum?
2. Hvørja meting hevur landsstýrismaðurin av støðuni í løtuni út frá tí kunning, sum hann fær?

Svar upp á spurning 1:

Løgmálaráðið fær javnan kunning um virksemið hjá løgregluni og ákæruvaldinum í Føroyum.

Eg havi regluligar fundir við fútan. Hesir fundir eru á leið fýra ferðir um árið og verði eg á hesum fundum kunnaður um støðuna og virksemið hjá løgregluni í Føroyum. Harumframt verður skipað fyri fundum, um tørvur er á at fáa kunning um nakað átrokandi.

Umframt regluligar fundir við fútan, hava embætisfólk í Løgmálaráðnum regluligar fundir við embætisfólk í Justitsministerinum. Løgmálaráðið hevur fýra støðufundir um árið við Justitsministeriet, har millum annað aktuell mál og mál á ikki yvirtiknum økjum verða umrødd. Eisini er ein árligur fundur á embætisstøði í Føroyum, tá ið Justitsministeriet vitjar ríkismyndugleikarnar í Føroyum.

Harumframt eru umboð frá landsstýrinum, harundir umboð frá Løgmálaráðnum, limir í Politiøkisráðnum. Fundir í Politiøkisráðnum eru fýra ferðir um árið. Á fundunum verður kunnað um virksemið hjá løgregluni og innlit verður givið í arbeiðið hjá løgregluni.

Svar upp á spurning 2:

Løgreglan og ákæruvaldið í Føroyum eru undir donskum málsræði. Hóast samstarvið við danskar myndugleikar er gott og eg verði kunnaður um virksemið og støðuna hjá løgregluni og ákæruvaldinum í Føroyum, so hevur tað ávísar avmarkingar og avbjóðingar við sær, at talan er um danskt málsøki. Sum landsstýrismaður havi eg ongan myndugleika yvir løgregluna og ákæruvaldið, og hetta hevur millum annað við sær, at eg sum landsstýrismaður havi avmarkaða ávirkan á tær raðfestingar, sum løgreglan og ákæruvaldið gera.

Eg meti tað vera sera óheppið, at tað tekur løgregluni og ákæruvaldinum langa tíð at avgreiða ávís mál, og eg kann undra meg yvir tær raðfestingar, sum ákæruvaldið í summum førum hevur gjørt. Í ávísum førum er tó talan um mál, sum eru trupul at lýsa og mál, sum fakmyndugleikar eru við til at lýsa. Slík mál taka langa tíð at avgreiða.

Eg havi sum landsstýrismaður eina greiða væntan um, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum arbeiða útfrá meginregluni um at verja rættartrygdina, og at halda lóg og landaskil, og at løgreglan og ákæruvaldið útinna sín myndugleika í Føroyum sambært ríkislóggávu eins væl og serlóggávu. Tað er tí mín greiða væntan, at løgreglan loysir tær uppgávur, ið henni er áløgd sambært grindalógini og tryggjað verður, at sýslumenn og grindaformenn fáa røkt sínar uppgávur sambært lóggávu og siðvenju í Føroyum.

Tá ið fótbóltsófriðarkroppar í fjør gjørdu ónáðir í Havn, var talan um eina støðu, sum í ávísan mun kom óvart á løgregluna og fyriskipararnir. Talan var tó um hendingar, sum vit tíverri eisini hava sæð í grannalondum okkara, og sum løgreglan í grannalondunum eisini hevur trupult við at hava tamarhald á. Landsstýrið og Justitsministeriet hava umrøtt hendingarnar og møguleikan at útvega neyðuga løgfrøðiliga grundarlagið, soleiðis at løgreglan betri fær handfarið stórar og ófriðarligar mannamúgvur í samband við størri tiltøk.

Tíverri hava vit eisini seinastu tíðina sæð, at hald hevur verið lagt á stórar nøgdir av rúsevnum í Føroyum og at rúsevnistrupulleikarnir í Føroyum eru vaksandi. Í næstum verður eitt stórt mál um rúsevnasmugling viðgjørt í Føroya rætti, og hetta síggi eg sum tekin um, at økið verður raðfest av løgregluni og ákæruvaldinum. Fyri at basa rúsevnistrupulleikanum er tó tørvur á raðfesta fyribyrgjandi arbeiðið og at minka um eftirspurningin av rúsevnum í Føroyum. Hetta arbeiðið krevur á tvørfakligt samstarv millum land, kommunur og ríkismyndugleikar, og samstarv tvørtur um geirar og fakøki.

Kunningin, sum landsstýrið fær frá ríkismyndugleikunum um virksemið og støðu tess í Føroyum, er batnað munandi seinastu árini. Tað er týdningarmikið, at gjøgnumskygni valdar innan allar myndugleikar, ið virka í Føroyum. Hetta umfatar eisini ríkismyndugleikarnar.

Hóast landsstýrið ikki hevur sett sær sum mál í samgonguskeiðinum at fáa løgreglu, dómsvald og brotsmálaumsorgan undir føroyskt málsræði, so haldi eg yvirskipað, at tað er eitt mál, ið eigur at verða raðfest. Stórur partur av fyrireikandi arbeiðinum hesum viðvíkjandi er áður gjørt, og tað

vantar einans politisk semja um at fáa hetta framt í verki. Hetta átti at verið gjørt innan eitt styttri áramál.

Løgmálaráðið, 28. februar 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður